# En enkelt og mere passende model for et færøsk MMP valgsystem

MICHAEL FELDBALLE



På foranledning af debatten forud for fremlæggelsen af lovforslaget om, at gøre Færøerne til en valgkreds og den positive debat i Miðlahusið dagen før fremlæggelsen, har jeg udarbejdet en langt mere enkelt model for et MMP valgsystem. Dette system indeholder fremdeles en opdeling af mandater valgt til Lagtinget, på baggrund af kredsmandater og partilistemandater. Antallet af kredsmandater foreslås fastholdt ved 7, da det giver en ligelig fordeling af mandaterne valgt i valgkredsene. Det antal mandater der vælges på partilisten foreslås sat til 26, for at give de mindste partier en forbedret mulighed for repræsentation. Derved kommer det samlede antal mandater i Lagtinget op på 33.

Det afgørende nye ved dette forslag ligger i, at den erfaringsmæssigt noget problematiske to-stemme model, er ændret til, at vælgeren kun afgiver 1 stemme. Denne stemme kan tildeles personligt eller til partiet. Hvis den tildeles personligt vil den, som i dag, også være givet til kandidatens parti.

Fordelingen af stemmerne og den deraf følgende transformation ligger i den efterfølgende behandling af stemmerne. De samme stemmer benyttes således til to udregninger: 1) Først udregnes en proportional fordeling af stemmerne baseret på partistemmer på landsplan. Denne opgørelse foretages ved hjælp af Saint lagüe fordelingsmetoden. 2) Dernæst udregnes for hver valgkreds, hvilket parti der har fået flest stemmer. Denne summering er udtryk for, hvilket parti der skal tildeles kredsmandater i hver enkelt kreds.

På den måde opnår man en proportional korrekt mandatfordeling for alle partier i Lagtinget, samtidig med at man kan anføre, hvilket parti, der skal have del i de 7 kredsmandater.

Den endelige fordeling af mandater i de enkelte partier foreslås foretaget på følgende vis: 1) Kredsmandat tildeles den opstillede politiker, i det berettigede parti, der har opnået flest personlige stemmer. Dermed tildeles kredsmandaterne til de lokale områders mest populære kandidater. 2) De resterende 26 mandater kan efterfølgende fordeles efter personlige stemmer eller efter listeopstilling, afhængig af hvordan det enkelte parti ønsker at foretage sin opstilling på landsplan.

Partierne opstilling foreslås foretaget i de eksisterende valgkredse, efter den model der benyttes i det nuværende valgsystem. Men vælgeren vil få mulighed for at stemme på alle kandidater over hele landet. Valgresultatet – vælgerens beslutning – vil efterfølgende afgøre hvilke politikere der vælges til at repræsentere valgkredsen eller partilisten. Om det vil få den store betydning i praksis, skal jeg ikke vurdere her.

Afgørende ved dette forslag til et nyt MMP-valgsystem er, at det udover at give de fordele som MMP-valgsystemet i sig selv har, samtidig: 1) Er lettere af forstå for vælgeren, 2) giver både kreds, og landsrepræsentation, 3) giver mulighed for særlige opstillingslister (f. eks. kvindelister), 4) giver vælgeren mulighed for at stemme på præcis den kandidat man ønsker og 5) sikrer alle valgkredse repræsentation. Men det kan vise sig, at der i tilgift kan være en række andre fordele samt udfordringer, der kan være udslagsgivende for om forslaget kan bruges i praksis.

**Eksempel på stemmefordeling baseret på valgresultatet 2004.**

| | |
|---|---|
| Spærregrænse % | 4 |
| Antal stemmer | 1268 |

| Parti | Valgkreds NO | EY | NS | SS | VA | SA | SU | Samlet |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A | **1434** | 1217 | 531 | 2041 | 532 | 259 | 516 | 6530 |
| B | 602 | **2012** | **663** | 2638 | **663** | 105 | 818 | 7501 |
| C | 741 | 1254 | 489 | 2267 | 373 | **326** | **1471** | 6921 |
| D | 264 | 529 | 60 | 527 | 39 | 22 | 20 | 1461 |
| E | 849 | 1254 | 582 | **3076** | 263 | 285 | 581 | 6890 |
| H | 148 | 466 | 78 | 790 | 79 | 26 | 74 | 1661 |
| K | 29 | 144 | 89 | 432 | 24 | | 29 | 747 |
| Samlet | 4067 | 6876 | 2492 | 11771 | 1973 | 1023 | 3509 | 31711 |

Stemmefordeling jf. Saint Lagüe

| Partier | A | B | C | D | E | H | K | Samlet |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stemmer | 6530 | 7501 | 6921 | 1461 | 6890 | 1661 | 747 | 31711 |
| Over spærre grænse | 6530 | 7501 | 6921 | 1461 | 6890 | 1661 | 0 | 30964 |
| Divisor | | | | | | | | |
| 1 | 6530,0 | 7501,0 | 6921,0 | 1461,0 | 6890,0 | 1661,0 | 0,0 | |
| 3 | 2176,7 | 2500,3 | 2307,0 | 487,0 | 2296,7 | 553,7 | 0,0 | |
| 5 | 1306,0 | 1500,2 | 1384,2 | 292,2 | 1378,0 | 332,2 | 0,0 | |
| 7 | 932,9 | 1071,6 | 988,7 | 208,7 | 984,3 | 237,3 | 0,0 | |
| 9 | 725,6 | 833,4 | 769,0 | 162,3 | 765,6 | 184,6 | 0,0 | |
| 11 | 593,6 | 681,9 | 629,2 | 132,8 | 626,4 | 151,0 | 0,0 | |
| 13 | 502,3 | 577,0 | 532,4 | 112,4 | 530,0 | 127,8 | 0,0 | |
| 15 | 435,3 | 500,1 | 461,4 | 97,4 | 459,3 | 110,7 | 0,0 | |
| 17 | 384,1 | 441,2 | 407,1 | 85,9 | 405,3 | 97,7 | 0,0 | |
| 19 | 343,7 | 394,8 | 364,3 | 76,9 | 362,6 | 87,4 | 0,0 | |
| 21 | 311,0 | 357,2 | 329,6 | 69,6 | 328,1 | 79,1 | 0,0 | |
| 23 | 283,9 | 326,1 | 300,9 | 63,5 | 299,6 | 72,2 | 0,0 | |
| 25 | 261,2 | 300,0 | 276,8 | 58,4 | 275,6 | 66,4 | 0,0 | |
| 27 | 241,9 | 277,8 | 256,3 | 54,1 | 255,2 | 61,5 | 0,0 | |
| 29 | 225,2 | 258,7 | 238,7 | 50,4 | 237,6 | 57,3 | 0,0 | |
| 31 | 210,6 | 242,0 | 223,3 | 47,1 | 222,3 | 53,6 | 0,0 | |
| 33 | 197,9 | 227,3 | 209,7 | 44,3 | 208,8 | 50,3 | 0,0 | |

| | A | B | C | D | E | H | K |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Antal stemmer pr. Parti | 7 | 8 | 7 | 2 | 7 | 2 | 0 |
| Kreds mandater | 1 | 3 | 2 | | 1 | | |
| Partilistemandater | 6 | 5 | 5 | 2 | 6 | 2 | 0 |

# Føroyar sum eitt valdømi?

NIELS MIDJORD



Í høvuðsheitum ber til at siga, at bústaðarmynstrið í Føroyum er tengt at tveimum hugtøkum, sum hála hvørt sín veg. Annað er hugtakið um at liva í og við náttúrini, við tí persónliga frælsi, sum harvið fylgir, men eisini tí knossi, sum stendst av, at tú tá, í stóran mun, ert tín egni veitari. Hitt er hugtakið um býarlívið, har tú fært meira í fang, og har tú í størri mun ert brúkari heldur enn veitari. Í løtuni er hugtakið um býarlívið við yvirlutan, men hitt hugtakið hevur eisini stóra megi: T.d. hava vit stutt síðan upplivað eina steypafinalu millum tvey lið, annað við um 10 faldaðum fólkagrundarlagi í mun til hitt, og har liðið við minna fólkagrundarlagnum vann. Og um vit taka t.d. rithøvundar, tónlistafólk ella listarfólk yvir høvur og seta tey í mun til støddina á kommununi, har tey eru uppvaksin, so hava bygdirnar greiðan munin framum stórplássini. Hetta bendir á, at tú kanst økja um lívførið hjá landinum við at fjálga um bygdirnar.

Ikki hugsi eg, at tað verður lættari at føra landspolitikk við einari valskipan, sum tryggjar miðstaðarøkinum meiriluta á tingi, heldur enn einari skipan, sum tryggjar hvørjum landsluti sær umboðan. Kundi í hesum sambandi trivið í eini viðurskifti, sum í fluttari merking lýsa hesa støðuna: Høvuðsferðsluæðrin til Havnar er síðuvegur til ringvegin. Hetta førir við sær, at tá íð klokkkan nærðkast 8 á morgni, verður ferðsluproppur við hetta vegamótið, og bíðirøðin av bilum røkkur ofta heilt niðan árakað keypsamtøkuna í Hoyvík. Nógvir arbeiðstímar munnu vera farnir fyri skeyti í hesi bíðirøð millum ár og dag, og landið man hava mist væl av peningi, av hesum áum. Trupulleikin kundi verið loystur við einum málingarblikki; nevnuliga soleiðis, at hávatenninar verða fluttar frá Hvítanesvegi til vegin Yvir við Strond; men hetta er ikki trupulleikin hjá teimum havnarfólkum, sum eru á ringvegnum, og sum støðugt mala rundan um Havnina, meðan tey, sum koma uttan ífrá standa í bíðirøð. Man hetta ikki fara at vera lagið, tá íð vallógin er broytt soleiðis, at miðstaðarøkinum er tryggjað meiriluta á tingi? Man meirilutin ikki tá fara at lívga um miðstaðarøkið og kalla tað landspolitikk, meðan bygdirnar bløða út í friði og náðum, og landið sum heild gert alt meira grátt, keðiligt og fátakt, við tað at samfelagslig-, virkis-, søgulig- og mentunarlig virði harvið fara fyri skeyti? Og tá íð so hugtakið um býarlívið at enda einsamalt hevur fingið yvirtakið, er deyðin í durinum. Tá fara tey, sum verðunliga vilja naskað, at flyta til New York, London, Keypmannahavnar ella onkra aðrastaðni, har verðunligt býarlív er, tí Havnin verður ongantíð nakar stórbýur.

Men kanska verður rákið í framtíðini als ikki tað, sum vit vænta í dag. Hvussu nógv tíð og orka fer ikki til at flyta fólk til og frá arbeiði? Vit hava í okkara tíð upplivað eina ótrúliga menning av samskifti og teld. Eina menning, sum bara gongur skjótari fyri hvønn dag, íð fer. Kanska fara flestu fólk um stutta tíð at arbeiða heima hjá sær sjálvum? Um so verður, hava bygdirnar fyrimun fram um stórplássini hjá barnafamiljum, tí har er umhvørvið ikki so vandamikið og ikki ber til at hvørva í mongdini, av tí at øll kenna øll og partvíst eisini varða av hvørjum øðrun. Umhvørvið úti á bygd verður tí fríðari hjá børnum at vaksa upp í, og tá verður tað kanska, sum í gamlar dagar, at foreldrini og bygdin fara at taka sær av barnaansingini, meðan skúlin og barnagarðurin verða menningarstovnar burturav. Kanska fer hetta at skapa eydnuríkari menniskju? Og sum kunnugt eru eydnurík fólk góð arbeiðskraft, sum saktans fer at standa seg í altjóva kappingini. Men hetta er treytað av, at nakrar bygdir vera eftir, tá íð rákið vendir. Eru tær longu avtoftaðar, so er so mikið nógv farið fyri skeytið við teimum, at tað verður seinur dagur, at tær verða uppafturbygdar. Rák skifta, og tí man tað vera meira skinsamt at hava eina konservativa valskipan heldur enn eina skipan, sum glæðbeint ruddar fyri einum ávísum ráki, tí tá er so nógv farið fyri bakka, táið rákið vendir.

Niðurstøðan er, at uppskotið um Føroyar sum eitt vældømi kann gerðast vandamikið, tí tað kann leiða føroyskan politikk inn á eina kós, sum í síðsta enda kemur okkum øllum í óføri.